# LESING

## - ein góð byrjan



Hvat hevur týdning fyri fyrstu lesingina, og hvussu stimbra vit barnið best?

Útgevari: Mentamálaráðið 2019
Tekstur: Gunvør Højgaard og Osvald Jacobsen
Fotomyndir: Finnur Justinussen
Á myndunum: Helena D. Højgaard, Jógvan Páll Fjallsbak, Bjørg D. Fjallsbak, Rógvi D. Fjallsbak,
Kristianna Poulsen, Ró N. Galán og Trygvi N. Galán
Tekningar: Osvald Jacobsen
Uppseting: Gunvør Højgaard
Prent: Føroyaprent

# Góðu foreldur

Hugsanin við hesum bóklingi er at geva foreldrum eitt innlit í lesing og at vísa á, hvussu vit best kunnu stuðla barninum í tilgongdini at læra at lesa.

Helst eru onkrir spurningar í sambandi við fyrstu lesingina hjá barninum, so sum:

- *Hvussu læra børn at lesa?*
- *Nær skal barnið helst duga bókstavirnar?*
- *Hví leggja dent á sambondini millum bókstav og ljóð?*
- *Hvussu skulu vit lesa við barninum heima?*
- *Hvussu kunnu vit stimbra fyrstu skrivingina?*
- *Hvat hevur týdning fyri lesifatanina?*
- *Hvussu veit eg, um mítt barn mennist, sum tað skal?*

Við støði í gransking verður í bóklinginum víst á tað, sum hevur størst týdning fyri eina góða lesimenning. Týdningarmikið er, at skúli og heim arbeiða saman um lesingina, tí soleiðis hjálpa vit barninum best.

Øll børn skulu hava avbjóðingar og mennast, har tey eru, og okkara mál er, at tey øll koma væl í gongd og gleðast um at lesa.

Vónandi kann hesin bóklingur vera eitt gott amboð í samskiftinum millum heim og skúla.





# Lesing mennist yvir nógv ár

Vegurin at gerast ein góður lesari byrjar heima

Lesing er ein førleiki, sum mennist yvir nógv ár, og vegurin at gerast ein góður lesari byrjar heima, langt áðrenn børnini fara í skúla. Børn varnast skrivaða málið, tá ið tey vaksnu lesa søgur fyri teimum, peika og práta, meðan tey fylgja við í bókini, og tá ið tey síggja tey vaksnu lesa bløð og bøkur.

## Tíðin, áðrenn barnið fer í skúla, er virðismikil

Tíðin, áðrenn barnið fer í skúla, er týdningarmikil fyri lesingina, og tað er nógv, sum kann gerast áðrenn skúlabyrjan.

**Hóast vit ikki *læra at lesa,*
fyrr enn vit koma í skúla,
kunnu vit menna tær fortreytir,
sum styðja upp undir lesing,
áðrenn skúlaaldur.**

Tá ið barnið vísir áhuga og vil læra, eiga vit at stuðla tí

Børn eru ymisk. Summi hava als ongan áhuga fyri bókstavum og ljóðum áðrenn skúlabyrjan, meðan onnur halda tað vera stuttligt og spennandi. Tey spæla, at tey lesa og skriva, og tey duga kanska eisini at lesa og skriva nøkur orð.

Tá ið barnið vísir áhuga og vil læra, eiga vit at stuðla tí og lofta møguleikanum at menna barnsins vitan um bókstavir og orð, so tey gerast forvitin eftir at vita, hvat ið stendur skrivað.

## Tosa og lurta

Gott er at lesa nógv fyri barninum

Tann vitanin, barnið hevur við sær í skúla, hevur stóran týdning fyri lesingina. Tí er tað gott, um tað verður lisið nógv *fyri* barninum, og enn betri, um foreldur og barn lesa saman og tosa um tað, sum tey lesa. Barnið upplivir, at tað at lesa er stuttligt og lærurίkt, og so er tað eisini hugnaligt at sita saman við foreldrunum og lesa.

## Okkara skriftmál

Okkara talumál er bygt upp av ljóðum, og í skriftmálinum eru hesi ljóð umboðað av bókstavum. Tað hevur alstóran týdning, tá ið vit skulu læra at lesa, at vit eru varug við ljóðini í málinum. Øll lesing byggir á tað. So umframt at lesa nógv fyri og við barninum og økja um vitan og orðanøgd, er tað eisini mennandi, um foreldur og barn spæla sær við ljóðunum í málinum. Hetta kann vera við og ikki við bókstavum.

**Rím**

Nógv børn spæla sær við rímum tíðliga. Tað kann vera, at barnið kennir aftur rím og eisini rímar sjálvt:

Her eru ein **abbi** og ein **krabbi**.

Spælið tykkum við ljóðunum í málinum

Summi børn hava ikki natúrliga ans fyri ljóðunum í málinum, og tá kunnu foreldur við spæli hjálpa teimum at gerast meiri tilvitað um ljóðini.




Barnið er ofta áhugað í bókstavunum í sínum navni. Tá kunnu vit t.d. siga:

***Marin*** byrjar við ljóðinum /***m***/*, tað er sama ljóð sum í ***mamma***. ***Mamma*** byrjar eisini við ljóðinum /***m***/. Kennir tú nakað annað orð, sum byrjar við /***m***/?

Hevur barnið spælt sær við ljóðum og bókstavum fyri skúlaaldur, er lættari at koma í gongd við at læra at lesa.

* Ljóð verða skrivað á henda hátt /m/



Hvussu nógv orð barnið kennir, hevur stóran týdning fyri lesingina.

# Hvat er lesing?

**Lesing** er bæði tað at kunna **avkoda** (lesa) ein tekst og at **fata** tað, ið lisið verður. Báðir hesir partar mugu vera í lagi, fyri at vit kunnu tosa um lesing.

## Avkoding (síða 8-19)

Tá ið tú lesur ein tekst, mást tú duga at týða tey tekn, sum teksturin er settur saman av. Dugir tú ikki týða hesi tekn, sum eru bókstavirnir, og fáa eina meining burtur úr teimum, so er alt bert krutl uttan meining og innihald.

Tað hevur týdning, hvussu rætt og skjótt vit lesa

Tað hevur týdning, hvussu rætt og skjótt vit lesa. Gongur tað striltið at avkoda, og lesingin er ósamanhangandi við nógvum feilum, ávirkar hetta fatanina.

*Í fyrstu lesingini verður nógv orka brúkt upp á at læra børnini at avkoda, og tí fyllir hesin parturin nógv í bóklinginum.*

## Lesifatan (síða 20-23)

Lesing byggir á m.a. orðtilfeingi og málsligan kunnleika

Lesifatan byggir á ymsar førleikar, m.a. hvussu nógv orð vit kenna (orðatilfeingi), vitan um ymisk viðurskifti og málsligan kunnleika. Tað hevur eisini stóran týdning, hvussu *væl* vit kenna orðini.

Tá ið vit lesa, seta vit tað, ið vit lesa, í samband við tað, sum vit vita frammanundan. Tað er neyðugt at hava ein forkunnleika, soleiðis at vit kunnu meta um og hugleiða um tað, vit lesa.



Vit kunnu ikki rokna við, at børn av sær sjálvum finna út av, hvussu alfabetiska skipanin hongur saman.

# Avkoding

Lesing er í stóran mun ein málsligur førleiki

Okkara talumál kann býtast í smærri partar. Vit tosa í setningum. Setningar kunnu býtast sundur í orð, og orð kunnu býtast sundur í stavilsi. Eisini kann okkara talumál býtast í enn smærri eindir, nevniliga tey smæstu ljóðini, ið hava avgerandi týdning, tá ið vit skulu læra at lesa og stava.

## Ljóð og bókstavir

Vit hava eina alfabetiska skrift, og meginreglan er, at einstøku ljóðini verða skrivað við teknum, sum vit nevna bókstavir. Børn mugu skilja samanhangin millum ljóð og bókstav/ir, tí øll lesing byggir á tað. T.d. er navnið ***Ása*** sett saman av trimum ljóðum, /***á***/ /***s***/ /***a***/, sum verða skrivað við bókstavunum ***Á***, ***s***, ***a***.

Ljóðligt ansni avgerandi

Hetta, at vera varugur við ljóðini í talumálinum og at duga bókstavirnar, eru avgerandi førleikar, tá ið vit skulu læra at lesa.

Tað er tó ikki altíð, at talið av ljóðum í einum orði er tað sama sum talið av bókstavum. T.d. eru tvey ljóð í orðinum hjá, /hj/ /á/, men av tí, at fyrsta ljóðið verður skrivað við tveimum bókstavum, verða tað tvey ljóð, men tríggir bókstavir í orðinum.

So skriftmálið er einfalt, men samstundis so fløkt, og vit kunnu ikki rokna við, at børn av sær sjálvum finna út av, hvussu alfabetiska skipanin hongur saman.
Neyðugt er tí við miðvísari undirvísing.



# Vit arbeiða við ljóðum

Er barnið varugt við smæstu ljóðini í málinum?

Tá ið børn læra at lesa, er tað týdningarmikið, at tey skilja bygnaðin í orðum. Tey mugu læra um størru, ljóðligu eindirnar, so sum máltóna, rím, setningar, orð og stavilsi, og *serligur dentur má leggjast á, at børnini gerast tilvitað um tey smæstu ljóðini*.

Tá ið vit tosa, verða orðini søgd samanhangandi. Ljóðini eru ikki skild sundur, men hanga saman. Tað eina ljóðið fer yvir í tað næsta, so ringt er at siga, hvar eitt ljóð endar og næsta ljóð byrjar.

**!** Summi børn hava brúk fyri meiri venjing

Børn, sum ikki eru nóg ljóðliga ansin, hava serliga ringt við at eyðmerkja og skilja sundur ljóðini í orðum. Hesi børn hava brúk fyri meiri venjing í júst hesum.

**Rím**

Tá ið vit skulu gera børn varug við ljóð í talumálinum, er best at byrja við stóru ljóðeindunum. Her hugsa vit m.a. um *rím* og *stavilsi*.

Ein ***mús*** fór til ***hús***.
***Mús*** rímar eisini við ***lús*** og ***djús***.
Kennir tú onnur orð, sum ríma við ***mús***?

**Stavilsi**

Soleiðis býta vit orð í ***stavilsi***, eitt klapp fyri hvørt stavilsi:
Eg eiti ***Helena***. Eg havi trý klapp í mínum navni, ***He le na***.

Stuttligt at spæla ymisk spøl

Vit kunnu spæla ymisk spøl, m.a. *Stavilsiskríggj* (kortspæl) og vendispæl við rímum.

## Heima kunnu vit stuðla barninum

Í skúlanum verður nógv arbeitt við ljóðum í fyrstu lesi- og staviundirvísingini. Summi børn hava tó brúk fyri eyka nógvari venjing, og tá er gott, um heimið hjálpir til. Við at spæla okkum við ljóðum og bókstavum í orðum upp á ymsar mátar, kunnu vit stuðla barninum heima.

Niðanfyri eru dømi um, hvussu vit kunnu spæla okkum við *smæstu ljóðunum*:

Finn fyrsta ljóðið

- Dugir tú at finna fyrsta ljóðið í orðinum ***mús***? /***m***/
  Vit kunnu hjálpa barninum við at hála fyrsta ljóð út:
  ***mmmús*** /***m***/

Finn síðsta ljóðið

- Dugir tú at finna síðsta ljóðið í orðinum ***gás***? /***s***/
  Vit kunnu hjálpa barninum við at hála síðsta ljóðið út:
  ***gássss*** /***s***/

Hvørji orð byrja við sama ljóði?

- Her eru trý orð: ***ber***, ***hús***, ***bál***
  Dugir tú at finna tey orðini, sum byrja við sama ljóði?
  ***ber***, ***bál***

Git orðið

- Nú sigi eg ljóðini í einum orði, tey eru /***m***/ /***ú***/ /***s***/.
  Dugir tú at hoyra, hvat orðið er?
  Hála ljóðini út: ***mmmúúússs***
  Hvat heldur tú, orðið er? ***mús***



Hvørji ljóð?

- Nú sigi eg eitt orð. Orðið er ***síl***.
  Hvørji ljóð hoyrir tú í orðinum?
  Ljóðini eru /***s***/ /***í***/ /***l***/.



# Bókstavirnir

Bókstavurin ***s*** eitur ***ess***, men hann ljóðar sum ein físandi slanga /***ssss***/



Gongd kemur ikki á lesingina, fyrr enn børnini duga flestu bókstavirnar, bæði teir stóru og teir smáu. Tey mugu vita, hvussu bókstavirnir síggja út, hvussu teir eita, og hvussu teir ljóða.

Børnini mugu duga at skriva bókstavirnar. Tey mugu hava bókstavirnar goymdar í minninum, soleiðis at tey kunnu endurgeva teir á skrift. Tað krevur ein meiri fullfíggjaðan bókstavakunnleika at skriva bókstavirnar eftir minninum enn bert at nevna navn og ljóð.

## Bókstavagjøgnumgongd í skúlanum:




- Hvussu sær bókstavurin út?
- Hvussu eitur bókstavurin?
- Hvussu ljóðar bókstavurin?
- Hvussu verður bókstavurin framborin?
- Kennir barnið nakað orð, sum byrjar við bókstavinum?
- Kennir barnið nøkur orð, sum hava bókstavin í sær?
- Hvussu verður bókstavurin skrivaður?

Tær spæla *Fiska* við bókstavakortum



## Neyvt samband er millum bókstavakunnleika og lesing

Tað hevur týdning, hvussu lættliga og flótandi børnini megna at fáa røttu bókstavirnar fram, tá ið tey skulu brúka teir, t.e. hvussu grundleggjandi væl tey kenna teir.

Fyrsta lesingin krevur nógv av børnunum, tí tey skulu læra nógvar bókstavir upp á stutta tíð. Harafturat skulu tey læra tey ljóð, sum bókstavirnir umboða, bæði tá ið bókstavirnir standa einsamallir og saman við øðrum bókstavum. Hetta kann vera ein avbjóðing, og neyðugt er við nógvari venjing og nógvum uppafturtøkum. *Summi børn hava brúk fyri eyka nógvari venjing í at læra bókstavirnar.*

Miða móti, at barnið dugir bókstavirnar mitt í 1. flokki

Tað er sera týdningarmikið, at vit eru varug við, um barnið mennist og lærir bókstavirnar. *Miðað verður ímóti, at barnið dugir flestu bókstavirnar og tilhoyrandi ljóð mitt í 1. flokki.*

## Heima kunnu vit stuðla við at:

! Fylg við, um barnið lærir bókstavirnar

- tosa um bókstavirnar, navn og ljóð.
- syngja bókstavasangir saman við barninum.
- spæla bókstavaspøl, so sum *Fiska* og onnur kortspøl, vendispøl, har vit para stórar og smáar bókstavir.
- finna bókstavir í bløðum ella avísum.
- skriva, tekna ella mála bókstavir saman við barninum. Sig t.d. eitt bókstavaljóð og bið barnið skriva bókstavin.
- gera bókstavir úr leiri ella gandadeiggi.
- fylgja við, um barnið dugir teir bókstavir, sum eru gjøgnumgingnir í flokkinum. Dugir barnið at skriva bókstavirnar?




## Spæl við bókstavunum og endurtak aftur og aftur.

# At binda saman bókstav og ljóð

Eitt skriftmál er í grundini eitt slag av loyniskrift ella kodu. Tá ið vit læra barnið sambandið millum ljóð og bókstavir, geva vit tí amboð at loysa hesa koduna.

Arbeiða við ljóði og bókstavi saman

Ein bókstavur er bert eitt tekn, men verður hann knýttur at einum ljóði, gevur hann meining. Tí hevur tað best ávirkan á lesing og staving, um arbeitt verður bæði við ljóðum og bókstavum samstundis.

Avkoding grundarlagið undir lesing

Ein góð avkoding er grundarlagið undir allari lesing. Tí er tað so týdningarmikið at geva barninum rættar og góðar mannagongdir til at avkoda orð.

Børn læra tað einfalda fyrst, soleiðis at tey lættari kunnu síggja, hvussu skriftmálið er uppbygt og soleiðis loysa koduna.

Neyv lesing í 1. flokki er grundarlagið undir øktari lesiferð í 2. og 3. flokki.

## Fyrsta lesitilfarið

Tá ið børn byrja at læra at lesa, er týdningarmikið, at fyrstu lesitekstirnir eru skrivaðir við løttum, ljóðrøttum orðum. Orðini skulu vera sett saman av teimum bókstavum, sum børnini hava lært. Setningarnir skulu vera einfaldir og stuttir, og gott er við nógvum endurtøkum.



## Hvussu lesa vit heima?

Vit lesa við ljóðum

Tá ið vit lesa við barninum, lesa vit við ljóðum,
t.e. orðið ***sól*** verður lisið /*s*/ /*ó*/ /*l*/. Vit *"ljóðlesa"* orðið:

Hvørjum bókstavi/ljóði byrjar orðið ***sól*** við?
Bókstavurin eitur ***s*** og hann ljóðar /***sss***/

Hvør er næsti bókstavur/ljóð? /***óóó***/
So hála vit fyrsta ljóðið yvir í næsta ljóðið. /***sssóóó***/

Hvør er síðsti bókstavur/ljóð? /***lll***/
So er orðið /***sssóóólll***/ /***sól***/

Puntar við bókstavunum

Tað kann vera gott at hava smáar fýrkantar við bókstavunum á, tá ið vit lesa. Bókstavirnir liggja í lesibókini.
(kunnu vera 6cmx6cm):

á b l

á

á l

b á l

n á l

Um barnið hevur trupult við at lesa t.d. orðið ***bál***, kunnu vit í staðin fyri at geva barninum orðið, spyrja:

Hvussu eitur og ljóðar hesin reyði bókstavurin? /***á***/
Hvussu eitur og ljóðar tann aftasti bókstavurin? /***l***/
Hvat stendur nú? /***ááálll***/ /***ál***/
Hvussu eitur og ljóðar fremsti bókstavurin? /***b***/
Um tú setir /***b***/ framman fyri /***ál***/,
hvat orð fært tú so? /***bááálll***/ /***bál***/

Hvat orð fái eg, um eg skifti /***b***/ út við /***n***/? /***nál***/

Soleiðis kunnu vit venja bókstav og ljóð, tá ið vit lesa.
Vit gera somu venjingar, tá ið vit skulu stava eitt orð.

Seinni, tá ið longri orð eru í tekstinum, ber til at býta hesi í stavilsi. Vit petta orðið sundur, soleiðis at barnið kann lesa *eitt* stavilsi í senn.

T.d. býta vit orðini *gáva* og *gularót* soleiðis:

gá | va     gu | la | rót

## Les, les, les

Lesing er ein førleiki, ið má venjast. Í fyrstani er lesingin ótrygg; børnini ivast í bókstavunum, og tey hava hug at gita. Lesingin mennist yvir tíð, og út á várið í 1. flokki kemur rættilig gongd á lesingina. So við og við verður lesingin tryggari og lesitekstirnir meiri krevjandi.

Út á várið í 1. flokki kemur gongd á

Ein trygg avkoding er grundleggjandi í lesingini, men tað hevur eisini týdning, hvussu *skjótt* vit lesa. Er lesingin ósamanhangandi og sein, kann tað ganga út yvir, hvussu væl vit fata tað, vit lesa. Tá ið barnið lesur trygt og rætt, fer lesiferðin upp, um tað verður lisið nógv.

Eisini týdning, hvussu skjótt vit lesa

**Rættleiki fyrst, síðan ferð**.

Við góðari undirvísing og stuðli heimanífrá koma flestu børn væl í gongd við at lesa. Tá ið gongd er komin á avkodingina, ræður um at venja nógv. Endamálið er, at øll børn gerast sjálvbjargnir og skjótir lesarar, soleiðis at tey kunnu lesa ein tekst uttan at skula hugsa um at avkoda orðini, men heldur kunnu savna seg um innihaldið í tí, tey lesa.

Ven lesingina við barninum heima 10-15 minuttir hvønn dag.

Les við barninum hvønn dag

## Lesur mítt barn nóg væl?

Í skúlanum verður frá byrjan fylgt við, um barnið kemur væl í gongd við at lesa og skriva, og um tað mennist.

Bókstava-, lesi- og stavikanningar í 1. og 2. flokki

Í fyrsta og øðrum flokki verða bókstavakunnleiki og lesi- og staviførleiki kannaðir ávís tíðarskeið, og úrslitið sigur, hvussu gongst tínum barni. Skúlin kunnar tykkum um, nær hesar kanningar verða gjørdar, og um úrslitið eftirfylgjandi.

Ert tú í iva um, hvussu gongst tínum barni, ber til at venda tær til læraran. Skúlin hevur eisini ráðgevar í lesing, sum kunnu vegleiða tykkum.

Skúlin hevur serkøn fólk, sum kunnu ráðgeva

## Ferð á lesingina

Summi børn hava trupult við at fáa ferð á lesingina, og ov nógv orka fer til at avkoda orðini. Besta venjingin er, at børnini **lesa upp** fyri onkrum vaksnum. Ein háttur, sum er mennandi fyri bæði rættleika og skjótleika, og sum er nógv brúktur, er *endurtikin lesing*.



### Endurtikin lesing

- **Barnið lesur tekstin fleiri ferðir.**
  Í fyrstu lesitekstunum, meðan barnið lærir seg at avkoda, verður *allur teksturin* lisin fleiri ferðir.

  Seinni, tá ið barnið er komið nakað longri, verða útvaldar síður ella brot úr tekstinum lisin fleiri ferðir, 50-100 orð. Barnið lesur tekstin, til tað lesur raðið. Hetta kann vera upp í fýra ferðir. Er tað meiri enn tað, er teksturin ov trupul.

- Tá ið barnið hevur lisið tekstin fyrstu ferð, verður **tosað um orð og hugtøk**, sum barnið møguliga ikki kennir. Onkur orð kunnu verða sligin upp í orðabók.

  Eisini verður arbeitt við orðum, sum barnið hevði trupult við at lesa. Orðini kunnu býtast í stavilsi, tosað verður um tey, og víst verður á serlig eyðkenni.

- Tá ið barnið lesur tekstin aðru ferð, ger tað **færri feilir**, og aftur hesa ferð verður tosað um tey orð, sum eru trupul hjá barninum at lesa.

- Triðju ferð lesur barnið væl betur, og tað eru færri villur, og **ferðin økist**.

  Les møguliga tekstin eina ferð afturat, men helst er nokk at lesa tríggjar ferðir.

# Fyrsta skrivingin

## Lesing og skriving ganga hond í hond

Tað er týdningarmikið, at børnini beinanvegin byrja at skriva, tí lesing og skriving *saman* hjálpa barninum at minnast og skilja sambandið millum bókstav og ljóð.

Byrja við nøkrum bókstavum

Flestu børn duga at skriva onkrar bókstavir, tá ið tey koma í skúla, og tey hava eisini roynt at skriva orð. Í fyrstani skrivar barnið møguliga bert onkrar bókstavir í orðinum. Barnið skrivar kanska fyrsta bókstav ella teir bókstavir, ið hoyrast best. Tað megnar ikki enn at skriva ein samanhangandi tekst.




Skrivingin mennist øll skúlaárini

So við og við koma fleiri bókstavir upp á pláss í orðunum, skrivingin verður meiri fullfíggjað, og barnið megnar at skriva samanhangandi setningar og smáar søgur.

## Staving

Byrja við ljóðrøttum orðum

Í skúlanum verður nógv lisið og skrivað. Barnið lærir so líðandi at *stava* orð. Fyrsta málið er, at tað dugir at stava *ljóðrætt**. Hetta er grundarlagið undir eini tryggari staving seinni.

* At stava *ljóðrætt* merkir, at orðini verða skrivað, júst sum tey eru søgd, t.d. orðini *sól* og *bilur*. Dømi um orð, sum ikki er ljóðrætt, er orðið *kúgv* /kigv/.

Hvat vænta vit, at barnið dugir?

Stavingin mennist støðugt, og tað verður lættari at skriva.

- Málið er, at barnið í endanum av 1. flokki dugir at stava smá, ljóðrøtt orð.
- Í endanum av 2. flokki dugir barnið uttan trupulleikar at stava ljóðrætt. Aftrat hesum dugir barnið at stava smá, vanlig, ikki-ljóðrøtt orð, sum t.d. *og*, *eg*, *tað*, *dag*.

## Hvussu kunnu vit stuðla heima?

Eggja barninum til at skriva

Tað er umráðandi, at barnið upplivir, at tað er stuttligt at skriva.

- Lat barnið skriva heima. Tað kann vera alt møguligt, eitthvørt, sum barnið hevur áhuga fyri.

Vís áhuga og rósa barninum

- Rósa barninum so ofta, tú kanst. Vís á tað, sum er gott.
- Lat barnið lesa tað, ið tað hevur skrivað, upp fyri tær.
- Ikki rætta tað, ið barnið skrivar, uttan so at barnið spyr.

Tá ið barnið spyr, eiga vit at vegleiða

Um barnið spyr, eiga vit at hjálpa.

Tað kann vera, at barnið hevur skrivað ein tekst um eina gás. Tað hevur skrivað ***gs*** fyri orðið ***gás*** og spyr, um orðið ***gás*** er rætt. Tá kunnu vit t.d. siga:

*Hetta er gott, sum tú hevur skrivað, tí bókstavirnir **g** og **s** eru púra rættir.*
*Har manglar bara **ein** annar bókstavur. Hvør man tað vera?*

Barnið hugsar seg um og lærir

*Hála orðið út og sig: **gááás.***
*Hoyrir tú ljóðið mitt í orðinum?*

Um barnið enn ikki dugir, hjálpa vit tí at skriva orðið rætt.





# Lesifatan

Tað, ið vit fáa burturúr, tá ið vit lesa ein tekst, er í stóran mun tongt at tí, ið vit framman-undan vita um evnið, sum teksturin viðger. Vit seta tað, vit lesa, í samband við tað, ið vit longu vita, og soleiðis kunnu vit meta um og hugleiða um tað, ið teksturin er um.

## Orðatilfeingi

Mugu kenna týdningin av orðunum

Lesifatan byggir í stóran mun á, hvussu nógv orð, vit kenna, og eisini hvussu *væl* vit kenna orðini. Vit skilja ikki, hvat vit lesa, uttan so at vit kenna týdningin av flestu orðunum í tekstinum. Tí hevur tað so stóran týdning, at vit hava eitt ríkt orðatilfeingi.

Børn læra nýggj orð alla tíðina, bæði tá ið foreldur og lærarar fortelja teimum týdningin av ókendum orðum, og tá ið tey lurta, tosa, lesa og skriva.

Tað verða alsamt fleiri orð, sum børnini mugu duga

Fyrstu lesitekstirnir krevja ikki nógv av børnunum innihaldsliga, men tekstirnir gerast skjótt meiri krevjandi, og tað verða alsamt fleiri orð, sum børnini mugu læra. So skjótt sum børn eru tryggir lesarar, er tað, ið tey lesa, ein tann týdningarmesta keldan til at læra nýggj orð. Tí hevur tað alstóran týdning, at øll børn koma væl í gongd við at lesa, og at tey lesa nógv.

## Arbeitt verður við lesifatan frá fyrsta degi

Í skúlanum verður nógv arbeitt við lesifatan

Í skúlanum verður nógv arbeitt við lesifatan í dagligu undirvísingini, í teksti, sangum, felags framløgum, og tá ið lærarin lesur upp fyri børnunum og samskiftir við tey um nýggj orð og hugtøk. Fyri at barnið skal ogna sær nýggju orðini, er neyðugt við nógvum endurtøkum.

## Lesing er uppliving

Vit lesa fyri at uppliva og fyri at fáa nakað burtur úr tí, ið vit lesa. Tá ið børn lesa, mugu tey:

- gera sær hugsanir um tekstin ella bókina, áðrenn tey lesa.
- duga at seta viðkomandi spurningar til tekstin.
- eyðmerkja og finna út av truplum orðum og orðingum. Steðga á, tá ið eitthvørt er, sum barnið ikki skilir. Onkur brot skulu møguliga lesast fleiri ferðir.
- duga at endurgeva tað, ið tey lesa.

## Hvussu kunnu vit stuðla heima?

Tosa og lurta

**Í sangum er stórt ríkidømi**, og vit endurtaka nýggj orð aftur og aftur ♪ ♫

Til tess at menna *vitan*, *orðanøgd* og *hugtøk*, er gott at syngja saman, spæla við rímum og ramsum, fortelja søgur og at lata barnið fortelja.

Lær barnið nýggj orð so ofta, sum tú kanst.

Tosa við barnið. Tosa um tað, ið barnið hevur upplivað í skúlanum.

Barnið lærir við at seta orð á.



## Skapa áhuga fyri lesing

Les bøkur fyri og við barninum. Lat løtuna vera hugnaliga og gev tær góða tíð.

Hjálp barninum at lesa tað, ið tað hevur fingið fyri at lesa heima. Lat barnið lesa tekstin upp fyri tær. Rósa barninum og vís á tað, ið barnið dugir.

Tosa við barnið um tekstin, tá ið tit lesa heima. Hjálp barninum at skilja tað, ið tað lesur.

# Góð ráð, tá ið vit lesa fyri og við barninum

## Áðrenn vit lesa:







Tosa um bókina, áðrenn tit lesa

- Tosa um bókina, áðrenn tit byrja at lesa. Tosa um permuna, heitið á bókini og um myndina, um har er ein mynd.
- Fá barnið at gita, hvat bókin man vera um. Les tekstin á baksíðuni, les yvirskriftir o.s.fr.
- Um bókin er um eitt evni, sum barnið veit eitt sindur um, tosa so um tað, ið barnið veit frammanundan. Lat barnið fortelja.

## Meðan vit lesa:

Tosa um orð, hugtøk og myndir

- Endurtak nýggj orð fleiri ferðir, so barnið lærir tey. Knýt samband millum tekstin í bókini og upplivingar hjá barninum.

Set opnar spurningar

- Set opnar spurningar til tekstin, ikki ja/nei spurningar. Spyr: ***Hví heldur tú, at Óli er keddur?*** heldur enn: ***Er Óli keddur?***
- Lat barnið gita, hvat fer at henda.
- Vís barninum, at vit kunnu lesa tekstin umaftur, um vit ikki skilja hann fyrstu ferð. Hugsa hart og sig: ***Eg eri ikki vís í, hvat stóð har. Eg má lesa tað eina ferð afturat.***

Lat barnið fortelja

- Lat barnið fortelja og endurgeva tekstin, meðan tit lesa.

## Tá ið vit eru liðug at lesa:

Tak samanum

- Tosa um bókina, tak samanum. Les kanska bókina aftur.

***Dugir tú at fortelja mær, hvat bókin var um?***
***Var hon góð?***
***Hvat dámdi tær best?***
***Hvat var stuttligt/spennandi/undranarsamt?***
***Var tað nakað, sum tú ivaðist í?***

**Børn, sum halda,**
**at tað er stuttligt at lesa,**
**og sum tí lesa nógv í síni frítíð,**
**fáa størri orðatilfeingi**
**og skriftmálsliga vitan,**
**og tey hava tí lættari við at skilja**
**innihaldið í tekstum.**

**5 góð ráð í lesing:**
**LES, LES, LES, LES, LES**

# Góðu foreldur

Tað er ein spennandi tíð, nú barn tykkara fer í skúla.

Tað er ikki eiti á, sum børnini eru errin og spent, tá ið tey møta fyrsta skúladag við fínari skúlatasku, fullari av væl spískaðum blýantum. Tey hava glett seg leingi, tí nú fara tey at læra seg at lesa og skriva.

Nógv er granskað í lesing kring allan heim seinastu mongu árini, og í dag hava vit holla vitan um, hvat ið hevur týdning, tá ið eitt barn skal læra at lesa. Málið er ikki bara, at børnini læra at lesa, men eisini, at teimum fer at dáma at lesa og skriva.

Hóast skúlin hevur ábyrgdina av undirvísingini, er tað týdningarmikið, at skúli og heim arbeiða væl saman um lesingina. Tað er best fyri barnið, um skúli og heim tosa sama mál. Børnini eru trygg, og glað børn læra best.

Hesin bóklingur er skrivaður til tykkum foreldur og onnur avvarðandi, tí tit eru týdningarmestu viðspælararnir hjá barninum í tilgongdini at læra at lesa.